Norðurbryggjan letur upp 27. November:

Portur til Útnorður

MENTANARHÚS

Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Í hesum søguliga og stórbara húsinum fer m.a. føroyska Viðskiftastovan í Keypmannahavn at húsast í framtíðini

Mynd Jan Müller

Tað gongur eftir ætlan at innrætta fleiri hundrað ára gamla pakkhúsið á Grønlandsbrygge i Keypmannahavn, soleiðis at nýggju mentanarhúsið fyri londini í Útnorði, Føroyar, Grønland og Ísland verður latin upp hósdagin 27. November. Tá verða til steðar Margretha drotning, danski forsætisráðharrin og annars umboð fyri londini í Útnorði. Norðurbryggjan verður annars latin upp fyri almenninginum leygadagin 29. november.

Talan er um eina sera spennandi og áhugaverda verktætlan, sum verður figgjað av einum grunni hjá A.P. Møller og av myndugleikunum í Danmark, Føroyum, Grønlandi og Íslandi. Ætlanin er at Norðurbyggjan skal hýsa mentanarligum tiltøkum av ymiskum slag úr luttakaralondunum og kemur hon harvið eisini at virka sum eitt portur til Útnorður. Danir og útlendingar, sum vilja hava eina kenslu av, hvat hesi trý oyggjalondini í Norðuratlantshavi hava at bjóða kunnu við at vitja Norðurbryggjuna, fáa eina fatan av, hvat stendur teimum í boði við at vitja londini.

Umframt at ein partur av tí gamla pakkhúsinum verður brúktur til mentanarlig tiltøk, so fer hon eisini at vera karmur um so nógv annað virksemi eisini. Eitt nú fer íslendska sendistovan at halda til har og somuleiðis føroyska Viðskiftastovan og tann grønlendska við. Tvs. at húsini verða eitt slag av umboðstovu fyri øll londini í Útnorði. Tað verða so eisini aðrir stovnar og felog úr Útnorðurlondunum, sum fara at hava innivist í nýggja mentanarhúsinum í Keypmannahavn.

Fyrstu tiltøkini í Norðurbryggjuni eru m.a. framsýningin "Veiðumentan í Útnorði", Hasr verða so eisini mong listalig tiltøk. Nevdarformaðurin fyri Norðurbryggjuna er eingin mætari enn fyrrv. íslendski forsetin, Vigdis Finnbogadóttir.

Ein roynd at varðveita vald

Tað er avgerandi neyðugt, at vit varðveita persónsupplýsingar undir føroyskum lóggávuvaldi, og tí var neyðugt at skera ígjøgnum, sigur Høgni Hoydal, nú Elektron og peningastovnarnir hava stevnt bæði honum og Dáturáðnum, tí teir ikki sleppa at halda fram við at útbyggja Gjaldskipanina

RÆTTARMÁL

Ingi Rasmussen
ingi@sosialurin.fo

Høgni Hoydal er komin í rættiliga ódnarveður. Elektron hevur stevnt bæði Dátueftirlitinum og løgmálaráðnum og sigur, at Høgni Hoydal hevði ikki heimild í lógini at lýsa kunngerðina, sum steðgar Gjaldskipanini

Myndagerð: Álvur Haraldsen

Síðsta orðið er ikki sagt í málinum millum Elektron og løgmálaráðið. Seinnapartin fríggjadagin stevndi Elektron bæði Dátueftirlitið og Løgmálaráðið eftir 10 miliónum krónum í endurgjaldi í sambandi við, at Dátueftirlitið hevur steðgað Gjaldskipanini, sum verður framd í samstarvi við danska PBS.

Sostatt hevur Elektron í grundini stevnt sær sjálvum, tí landið eigur 40 prosent í Elektron. Peningastovnarnir eiga restina. Elektron stevnir við kravi um, at Dátueftirlitið verður dømt at viðurkenna, at avgerðin, sum eftirlitið tók í síðstu viku um persónsupplýsingar, var ólóglig. Harafturat verður fort fram, at kunngerðin um persónsupplýsingar, ikki samsvarar við løgtinglógina.

Turið Debes Hentze, forkvinna í Dátueftirlitinum, segði við Sosialin hósdagin, at Dátueftirlitið kundi ikki handlað øðrvísi. Tí kunngerðin, sum Høgni Hoydal lýsti 16. juni í ár, er ætlað at raka Gjaldskipanina hjá peningastovnum, og Høgni Hoydal hevði fulla heimild í lógini at lýsa kunngerðina. Hon viðgongur, at tað einki hevur við ta trygd at gera, sum lógin um persónsupplýsingar frá 2001 snýr seg um. Hetta er reinur vinnupolitikkur, sigur hon, tí upplýsingarnar eru ikki viðkvæmar og landið, tær fara til, er trygt.

Protektionisma

Sostatt er talan um protektionismu, sum helst hevur til endamáls at varðveita arbeiðspláss og vitan í Føroyum. Trupulleikin er bara, at Elektron ikki vil verjast.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til málið, nú tað er eitt rættarmál, har hann stendur fyri skotum. Hann vísir bara á, at talan er um ein part í einum nýggjum lógarkompleksi, sum hevði til endamáls at verja einstaklingin í KT-samfelagnum.

Uppi í lógini hekk ein løgtingsavgerð frá 1994, sum hevði til endamáls at forða peningastovnunum at flyta sítt samskifti av landinum, vísir Høgni Hoydal á.

– Undir viðgerðini legði Løgtingið dent á, at persónsupplýsingar sum meginregla skulu varðveitast í Føroyum, og Rættarnevndin nevndi beinleiðis peningastovnarnar. Tað avgerandi er, at vit varðveita persónsupplýsingar undir føroyskum lóggávuvaldi. Tað gera vit neyvan, um alt so líðandi fer av landinum. Tí løgdu vit upp til, at tú skuldi hava undantak fyri at flyta persónsupplýsingar av landinum. Men tað broytti Rættarnevndin, sum kravdi eina herðing í lógini, tí hon vildi forða peningastovnunum at flyta sítt samskifti av landinum, sigur Høgni Hoydal.

Ivingasamt løgting

Landsstýrismaðurin vísir sostatt til løgtingið. Men tað er ein sannroynd, at tað er ógviliga ivasamt, hvat løgtingið heldur um málið. Fyrr í ár fekk løgtingið málið til viðgerðar, tí landsstýrismaðurin vildi hava tað ásett í lóg, hvat var galdandi, so hann slapp undan at seta tað í kunngerð. Men løgtingið avgreiddi ikki málið, áðrenn tingsetan var av, og tískil datt málið burtur. Eftir tað skar Høgni Hoydal ígjøgnum og lýsti kunngerðina 16. juni, sum steðgaði Gjaldskipanin.

– Løgtingið súltaði málið, og tí varð eg noyddur at gera eina kunngerð. Tað stendur løgtinginum fritt at taka málið uppaftur, og tí havi eg ikki tikið valdið frá løgtinginum í hesum málinum. Tað er mín ábyrgd at syrgja fyri, at rættarstøðan samsvarar við lógina, og tí kundi eg ikki bara bíða í ævir eftir løgtinginum, sigur Høgni Hoydal.

Noktar fyri avbyrging

Eftir stendur spurningurin, hvørjum Elektron skal verjast ímóti.

– Eg vil ikki verja Elektron ímóti nøkrum. Lógin forðar ikki fyri samskifti úteftir, og tað stendur Elektron fritt at samskifta við PBS. Ætlanin er bara, at upplýsingar um peningaligar flytingar millum fólk og stovnar í Føroyum verða goymdar í føroyskum skipanum og ikki uttanlands, sigur Høgni Hoydal.

Hann óttast ikki rættarmálið, sum kemur, tí hann er sannfordur um, at hann hevur gjørt soleiðis, sum løgtingið hevur álagt honum. Hinvegin sigur hann seg vera ógvuliga harman um, at tað er komið so vítt.

Fakta

Brot úr kunngerð nr. 94 frá juni 2003:

§ 1. Kunngerðin fevnir um persónsupplýsingar og viðgerð av persónsupplýsingum hjá peningastovnum

§ 2. Persónsupplýsingar og viðgerð av persónsupplýsingum í skipanum í Føroyum, hvørs høvuðsinnihald og –nýtsla eru peningaligar transaktiónir, flytingar ella annað samskifti ella virksemi millum einstaklingar, virki, stovnar o.t. í Føroyum, kunnu ikki flytast av landinum. Heldur ikki kann ein partur av hesum flytast av landinum.

Elektron-málið tikið upp í samgonguni

Ingi Rasmussen
ingi@sosialurin.fo

– Hetta ber í øllum førum ikki til. Nú verða Elektron og Gjaldskipanin steðgað mitt í einari brekku, og tað kann eingin liva við.

Soleiðis sigur Jógvan á Lakjuni, formaður í Rættarnevndini hjá løgtinginum, nú Dátueftirlitið hevur tikið avgerð í málinum um Gjaldskipanina hjá Elektron, sum er steðgað.

Turið Debes Hentze, forkvinna í Dáturáðnum hevur gjørt greitt, at talan ikki er um persónsverju, sum er endamálið við lógini, men um vinnupolitikk, sum hevur til endamáls at verja føroysk arbeiðspláss og know-how.

– Tað er ivaleyst rætt, at talan er um protektionismu. Tað hava vit ongantíð fjalt, men tað er sjálvandi ein spurningur um, hvørt tað er rætt at hava vinnuforðingar í eini lóg um vernd av persónsupplýsingum. Byrjanin til alt málið stavar heilt frá fyrst í 90-árunum, tá vandi var fyri at peningastovnarnir fluttu alt edv-samskifti av landinum. Tað forðaði løgtingið fyri tá, og hesin parturin hekk við, tá lógin frá 2001 kom fyri tingið, sigur Jógvan á Lakjuni.

Spurningurin er so, um tað var í løgtinginum, at upprunin til alt rumblið byrjaði. Tað heldur Jógvan á Lakjuni, men hann heldur, at málið nú er komið ov langt, og hann ætlar at taka tað upp í Fólkaflokkinum á fundi í dag.

– Eg havi alla tíðina verið ógviliga ivingasamur í hesum málinum. Vit mugu gjarna verja arbeiðspláss og servitan í Føroyum, so hon ikki verður avreitt av landinum. Men tað ber ikki til at steðga allari menning í samfelagnum, sigur Jógvan á Lakjuni.

Fyrr í ár var málið aftur fyri tinginum, men tá bleiv løgtingið ikki liðugt at viðgera málið, tí tað fall fyri tíðarfreistini. Jógvan á Lakjuni er ógviliga misnøgdur við, at Høgni Hoydal kortini skar ígjøgnum ta ferðina.

Vika 45, 2003
www.kaupthing.fo

Búskaparliga framgongdin í USA økist

MARKNAÐARRÁK

Sum væntað hækkaðu partabrøv og lánsbrævarentur í farnu viku, og nú flestu virkini í USA og Evropa hava kunngjørt roknskap, varð tað serliga búskaparligar uppgerðir sum ávirkaðu.

Týdningarmesta uppgerðin var yvir búskaparvøksturin í USA. Hendan vísti, at búskapurin í 3. ársfjórðingi vaks 7,2%, og hetta er hægsti vøkstur síðani 1984. Búskaparvøksturin verður dagfordur aftur í seinast í novembur og desembur, og roknast kann við, at vøksturin tá endar á einum lægri stigi enn 7,2%. Orsøkin er, at millum annað lánsumleggingar eiga stóran lut í høga vøkstrinum, og møguleikin fyri fleiri umleggingum er um at vera av.

Samanumtikið má sigast, at stór framgongd er staðfest í USA seinastu mánaðirnar, men mett verður stundum, at ov skjótt hevur gingið. Hóast lítil ivi er um, at amerikanski búskapurin er á rættari leið, skal roknast við, at búskaparligar uppgerðir til tíðir kunnu vísa á eina meira hóvliga gongd. Hetta kann stundum fáa lánsbrævarentur og partabrøv at fella aftur.

Týdningarmestu kunngerðirnar hesa vikuna verða vinnuálitið og arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin (báðar úr USA), ið verða kunngjørd mánadagin og fríggjadagin. Mett verður, at báðar uppgerðirnar verða bjartar og kunnu føra við sær, at lánsbrævarentur halda stigið ella hækka.

Hósdagin hevur evropiski miðbankin mánaðarliga rentufundin. Marknaðarrák metur ikki, at ECB broytir evropiska rentustigið. Áhugavert verður kortini, hvat ECB fer at siga um evropiska búskapin á tíðindafundinum. Hetta er fyrsti fundur, ið verður leiddur av nýggja formanninum Trichet.

Roknskapirnir kunngjørdir í farnu viku vóru flest allir góðir. Millum góðu roknskapirnar vóru teir hjá Ericsson, Danske Bank og Nordea. Flestu áhugaverdu roknskapirnir er sum kunnugt kunngjørdir. Tó er onkur eftir, ið kann flyta marknaðin. Ein av hesum er roknskapurin frá Cisco, ið verður kunngjørdur hósdagin. Onnur virkir, ið kunngerða hesa vikuna eru TDC, GN og Lundbeck, men hesir fara ikki at ávirka marknaðinar.

Aftur hesa vikuna verður mett, at partabrøv og lánsbrævarentur fara at hækka ella halda stigið. Stigið á marknaðunum er tó hækkað nógv í seinastuni, so sannlíkindi er allatíðina fyri vinningsstaðfestingum, og hetta kann føra við sær eina øvuta gongd.

Rentur

	Renta	+/- %-stig
Diskonto	2,00%	0,00%
2 ára lánsbrævr	2,94%	0,04%
5 ára lánsbrævr	3,77%	0,04%
10 ára lánsbrævr	4,53%	0,04%

Partabrævavísitøl

	Kursur	+/- %
KFX, Danmark	260,9	1,6%
OMX, Svøríki	623,4	1,4%
DJ Stoxx 50, Evropa	2.557,0	2,9%
S&P 500, USA	1.050,7	1,9%

Íløgufeløg

	Kursur	+/- %
Lánsbrøv í DKK	106,53	0,0%
Evru Lánsbrøv	163,47	-0,2%
Norrøn Partabrøv	71,80	1,9%
Altjóða Partabrøv	73,25	2,8%

Gjaldoyru

	Kursur	+/- %
USD	641,94	1,4%
EUR	743,31	0,0%
GBP	1.087,17	1,4%
NOK	90,25	0,3%

Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.